# Fiskimálaráðið umsitur tilvildarliga

**Fiskimálaráðið hevði ikki tíð at bíða eftir, at Landsstýrismálanevndin viðgjørdi málið um Ågot 1. Ræðisavmarkingarnar hjá skipinum vóru strikaðar, meðan Landsstýrismálanevndin viðgjørdi eina kæru frá Felagnum Línuskip. Umsitingin í Fiskimálaráðnum er púra tilvildarlig, sigur formaðurin í Felagnum Línuskip**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Jógvan (S) = Skoran:** | | | | | |
| Fiskiorka, sum skal út | | 270 | ella | 16 ella | 62,09 BRT |
| Fiskiorka, sum skal inn | | 334 | ella | 18 ella | 86,82 BRT |
| Munur hækking í % | | 24% | | 13% | 40% |
| **Skoran + Nakkur (Barið/Glottin) = Jógvan S (Ågot I):** | | | | | |
| Fiskiorka, sum skal út | 334 + 167 = | 501 | ella 18 + 13 = | 31 ella 86,82 + 32,47 = | 119,29 BRT |
| Fiskiorka, sum skal inn | | 1584 | ella | 40 ella | 272,45 BRT |
| Munur hækking í % | | 216% | | 29% | 128% |

*Fleiri ymsir mátar eru at rokna veiðiorku út uppá, og tað tykist, sum Fiskimálaráðið bara velur ta, sum í tí einstaka førinum passar best. Viðgerðin er púra tilvildarlig, heldur Rólant Poulsen, formaður í Felagnum Línuskip*

VEIÐILOYVI
*Edvard Joensen*

Meðan landsstýrismálanevndin hjá Løgtinginum viðgjørdi eina kæru um línuskipið Ågot 1, skundaði umsitingin í Fiskimálaráðnum veiðiloyvið hjá skipinum ígjøgnum við at strika ræðisavmarkingarnar, lagdar vóru á skipið, tá tað var selt úr Føroyum.

Tann triðja mars í ár kærdi Felagið línuskip avgerðina um veiðiloyvið hjá gomlu Ågot til Landsstýrismálanevndina. Men meðan málið var til viðgerðar í nevndini, strikaði Fiskimálaráðið tær ræðisavmarkingar, lagdar vóru á skipið. Felagið Línuskip mótmælir harðliga, at borgarfriðurin ikki verður hildin, meðan rætturin situr.

Rólant Poulsen, formaður í Felagnum Línuskip er ógvuliga misnøgdur við viðgerðina, sum málið um veiðiloyvið hjá Ågot hevur fingið í Fiskimálaráðnum. Hann heldur ikki, at alt er farið ræt fram í hesum máli, og vísir á, at tað tykist, sum útrokningar verða gjørdar, sum tað passar best í teimum einstøku málunum.

– Tað sær ógvuliga tilvildarligt út, tá veiðiorka verður roknað út. Tað er líkt til, at roknihættir verða valdir eftir, hvussu tað passar best í tí einstaka førinum. Við hvørt verður rúmdin brúkt og viðhvørt er tað kvadratrótin. Vanlig fók fáa ikki skil á tí, vísir hann á.

Hann vísir til eina tabell, har tvey skip verða sett upp móti hvørjum øðrum. Nýttir verða tríggir møguleikar, sum geva trý ymisk úrslit, ið so aftur kunnu brúkast, sum tørvur er á, sigur hann.

Rólant Poulsen sigur, at hann skilir væl, at Jacob Vestergard, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, ikki vil gera viðmerkingar til málið um Ågot/Jógvan S.

– Tí hetta er so groft dømi um økta fiskiorku og lógartulkingar, at tað kann landsstýrismaðurin ikki gera viðmerkingar til. Serliga ikki, tá skipið er strikað úr føroysku skipaskránni og útflutt til Noregs, sigur hann.

Hann heldur tað eisini vera løgið, at Fiskimálastýrið skal krevja váttan av bæði seljara og keypara fyri, at skipið ongantíð aftur skal í vinnu undir føroyskum flaggi, tá slíkar ræðisavmarkingar bara av embætismonnum kunnu takast av aftur, enntá meðan landsstýrismálanevndin hevur málið til viðgerðar.

Hann leggur tað út sum tilvildarliga viðgerð og lítið skil í umsitingini.

# Heimaftur frá Irak krígnum



*Amerikansku hermenninir kanna tyrlurnar á flogvøllinum í Vágum, áðrenn hildið verður fram til Støðina í Keflavík*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Tvær amerikanskar hernaðartyrlur, sum hava verið í Onglandi sum stuðul hjá amerikanskum herdeildum í samband við Irak kríggið, vóru hósmorgunin í Vágum á veg heimaftur**

HERNAÐARÚTGERÐ
*Edvard Joensen*

**Flogvøllurin:** Tvær amerikanskar hernaðartyrlur, sum hava verið patur av tilbúgvingini í samband við Irak kríggið, millumlendu í Vágum á veg heimaftur, nú kríggið er av.

Hósmorgunin stóðu vær amerikanskar Sikorsky HH60 hernaðartyrlur á flogvøllinum í Vágum. Tyrlurnar eru á veg aftur til Keflavíkar í Íslandi, har tær hava fasta støð.

H.A. Hartnett, sum er flogskipari á aðrari tyrluni, greiðir frá, at teir hava verið í Onglandi i smaband við tilbúgving, nú kríggj hevur verið í Irak.

– Vit komu ongnantíð til Irak, greiðir hann frá, men vit hava verið partur av verju og tilbúgving á amerikanskum støðum í Onglandi, har vit hava samstarvað við ensku løgregluna, sigur hann.

Tyrlurnar hava dagliga støð í Keflavík í Íslandi, sigur H.A. Hartnett, og hagar eru teir nú á veg aftur.

– Eitt so spennandi stað sum Irak komu vit ongantíð til, sigur Hartnett, og nú er kríggið liðugt, so mett verður ikki, at neyðugt er við okkara verju í Onglandi meira. Tí hava vit nú fingið boð um at fara aftur til støðina í Íslandi, sigur hann.

Tyrlurnar millumlendu í Vágum á veg úr Onglandi til Íslands, tí tær klára ikki allan teinin í einum. Menninir hava hvílt seg á Hotel Vágum, og hósmorgunin varð so riggað til at halda leiðina fram. Tyrlurnar vórðu eftirhugdar og brennievni koyrt á, áðrenn flogið varð víðari til Keflavíkar.

†

Boðað verður frá at kæra mamma okkara

**Marie Louise Hoydal**
fødd 6.4.1912 í Keypmannahavn

andaðist 29. apríl 2003.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju
leygardagin 3. mai kl. 15.00.

*Vegna familjuna*

**Egil, Gunnar, Kjartan og Annika**






